# ítróttur

Nr. 177 • leygardagur • 17. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Skála-HB:

# Meistaraskapurin stendur upp á spæl



**Báðir partar eru samdir um, at tað liðið, sum í morgin tapir á Skála, fer at hava vánaligar fyritreytir í endaspurtinum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Mest týdningarmikli lykladysturin higartil í hesum kappingarárinum. Tað er skoðsmálið, sum toppuppgerðin á Skála í morgin fær. Ikki soleiðis at skilja, at meistaraskapurin verður avgjørdur á Skála í morgin. Fleiri umfør eru eftir at stríðast í, og B36 er eisini framvegis sera gott boð upp á meistaraheitið.

Men bæði á Skála og í HB verður ásannað, at tað liðið, sum einki stig fer at fáa í morgin, fer at hava munandi verri fyritreytir at vinna FM, enn tað higartil hevur havt. Og báðir partar eru samdir í, at tað liðið, sum í morgin fer at fáa fulla úrtøku á Skála, verður sera væl fyri í FM kappingini.

- Vit fara eftir øllum stigunum.Tað gera vit hvørja ferð, og vit rokna við, at HB eisini fer at spæla fyri at vinna. Tað passar okkum væl. Vit hava havt ávísar trupulleikar móti liðum, sum hava lagt serliga stóran dent á verjupartin. Tað sóu vit móti KÍ og eisini móti ÍF. Spælið hjá okkum flýtur best, tá ið mótstøðuliðið eisini er við uppá tað, staðfestir Pauli Poulsen, sum er hjálparvenjari hjá Johan Nielsen.

### Tilfarið

Eugen Voda verður málverji í morgin. Skálamenn halda kortini ikki, at tað nýtist at gera fyritreytirnar nógv verri.

- Eugen hevur nógvar royndir. Hann var í málinum fyrstu umførini, áðrenn Vlada Filipovic kom henda vegin, og hann var stinnur. Eugen hevur vant saman við Vlada alla tíðina, og nú kemur tað honum og okkum sera væl við, verður sagt av Skála.

Tað kemur illa við, at Arnhold Berg í fyrradagin varð skorðin í knænum. Krossbandsskaðin frá í fjør hevur støðugt plágað, og nú er greitt, at Arnhold Berg ikki fer at spæla fótbólt næsta hálva árið. Birgir Jørgensen er so mikið vøddaskaddur, at hann ikki er førur fyri at spæla móti HB, og tað er Sveinur Justinussen, sum leingi hevur verið plágaður av knæskaða, heldur ikki. Hann er nú í Danmark, har teir skulu hyggja upp á knæið.

### Eyka møguleiki

Í HB er lagið gott, og teir siga seg vera væl fyri við fólki:

- Jóhannis Joensen er tó framvegis skaddur. Hans á Lag venur aftur, men knæskaðin argar framvegis nakað, so tað er ikki víst, at hann verður førur fyri at spæla í morgin. Annars eru allir hinir spælararnir tøkir, sigur liðformaðurin Rúni Nolsøe. Eisini Tór-Ingar Akselsen, sum hevur verið skaddur.

Fara tit inn á Skála at sparka fótbólt ella at spæla fótbólt?

- Tað skal eingin ivi vera um, at vit ætla okkum at spæla fótbólt. Síðani Julian Hansen fekk ábyrgdina av liðnum hevur hann miðvíst arbeitt við at betra um spælið. Tað gongur rætta vegin, men tað kann sjálvandi gerast væl betur. Síðst vóru Rókur Jespersen, Jákup á Borg og Bárður Mortansson í álopinum. Luftspælið er ikki størsta styrkin hjá teimum, so vit royna sjálvandi at spæla í føturnar á teimum, staðfestir Rúni Nolsøe, sum er tann, ið hevur spælt flestar dystir á besta HB liðnum. Áhugin tykist framvegis vera stórur, og hóast hann einki vil siga um tað, so kann tað væl hugsast, at ikki so fáir dystir fara at verða lagdir afturat teimum fleiri enn trý hundrað, sum hann longu hevur spælt við HB.

## EB/Streymur sum stórfavorittur

Skal metast eftir oddsunum, sum veddararnir hjá Nordicbet geva, so eru størstu favorittarnir hetta vikuskiftið at finna á Eiði og í Havn. Í Gøtu verður roknað við, at gestirnir hava besta møguleikan, og tó at roknað verður við jøvnum dysti á Skála, so eru heimamenninir her lítlir favorittar at taka stigini. Oddsini, sum kunnu finnast á heimasíðuni, www.nordicbet.com, eru hesi:

| Dystur | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| GÍ-NSÍ | 2,70 | 3,40 | 2,05 |
| B36-ÍF | 1,25 | 4,60 | 7,50 |
| EB/S-TB | 1,20 | 5,30 | 7,90 |
| Skála-HB | 2,15 | 3,40 | 2,55 |

**-mørk**

## Lassin fer til Noregs

7. oktober skal Lassin Isaksen saman við Jens Albert Simonsen og Tummas Paula Olsen døma U-21 landsdystin millum Noreg og Moldova. Eisini 4. dómarin til uppgávuna verður føroyskur, og er tað Páll Augustinussen, sum hevur fingið tillutað hesa uppgávuna.

**-mørk**

## Fair Play dagur

25. september er dagurin, sum FIFA hevur ásett at vera altjóða Fair Play dag. Í Føroyum eru eingir dystir á skránni hendan dagin, men FSF hevur tó gjørt av, at dagurin skal markerast í teimum dystum, sum verða spældir tann 23. september. T.v.s. at talan er um dystirnar, KÍ-ÍF, HB-VB, NSÍ-Skála, TB-GÍ og EB/S-B36.

Í hesum sambandi skulu feløgini ikki bara veittra við Fair Play flagginum hjá FIFA, men skal hetta verða borið inn av bóltdreingjum/gentum undan dystinum. Eisini skal eitt Fair Play lyfti lesast upp undan dystinum. Og so er bara eftir at vóna, at dystirnir eisini verða avgreiddir í besta ítróttaranda.

**-mørk**

## U-17 liðið úttikið

Føroyska U-17 landsliðið í fótbólti skal í døgunum, 12. til 19. oktober taka lut í sonevndari EM-minikapping í Portugal.

Venjarar hjá liðnum eru Pætur Clementsen og Finn Johannessen, og teir hava tikið fylgjandi spælarar út til uppgávuna: Rógvi Holm (AB), Rógvi Nielsen (AB), Jóan P. Jakobsen (B36), Johan Ellingsgaard (B36), Rúnar L. Jacobsen (B36), Rasmus Nielsen (B36), Torkil Kollsker (HB), John Hammer (KÍ), Álvur Christiansen (KÍ), Ari Samson (KÍ), Eli Simonsen (KÍ), Hans Jørgensen (KÍ), Páll Klettskarð (KÍ), Erling Jacobsen (GÍ), Heri Nesá (NSÍ), Filip Jacobsen (NSÍ), Klæmint A. Olsen (NSÍ), Henning Joensen (VB).

**-mørk**

## B68-fløga á marknaðinum

Í gjøgnum longri tíð hava stuðlar hjá B68 arbeitt við at fáa nakrar stuðulssangir hjá felagnum spældar inn á fløgu, og 12. september - 15. ára degnum fyri Landskronabragdinum hjá landsliðnum - kom fløgan so á marknaðin.

Í tí sambandi mundi tað vera ógvuliga hóskandi, at tað er fyrrverandi B68-venjarin og landsliðsskiparin, Jóannes Jakobsen, sum hevur yrkt ein av sangunum. Tann sangurin eitur Rómur yvir Svangaskarð, og er tað Kim Hansen, ið eisini hevur gjørt lagið, sum syngur sangin.

Eisini er ein nýggj útgáva av B68-sanginum frá gullárinum 1992, men tó at útsetingin er nýggj, so er tað enn sum áður Petur Hans Hansen, sum syngur lagið.

Umframt tekstin til eitt lag, hevur Jóannes Jakobsen eisini gjørt lagið til annan nýggjan sang, sum Kristina Viberg Andreasen syngur, og at enda hava Kim Hansen og James Olsen so eisini roynt seg við einum fótbóltssangi í tekno-stíli.

Fløgan kostar 100 krónur, og fæst hon til keyps í sølubúðum á toftum, og so sjálvandi eisini á Svangaskarði.

**-mørk**